Orðið stjórnarskipan ella konstitutión kann sum longu nevnt oman fyri allýsast við breiðari og smalari merking. Sambært breiðu allýsingini merkir stjórnarskipan øll tann stjórnarligu skipanina; t.e. lógir, ymiskar reglur (skrivaðar ella óskrivaðar), konventiónir, siðvenja og praksis. Tann smala allýsingin vísir vanliga til løgfrøðiligt skjal, t.e. stjórnarskipanarlóg. Henda merking líkist rómversk-germansku siðvenjuni, har stjórnarskipan verður kallað grundlóg (basic law, Grundgesetz), sum inniheldur hesa kjarnuhugsan: Grundlóg er truplari at broyta ella ógilda enn vanligar tinglógir. Grundlóg er hægsta lógin í einum lógarstigveldi (lógarhierarki); grundlógin er grundleggjandi lóg og kann eisini nevnast evstalóg, tí skipanin er grundað á meginregluna lex superior. Henda smala merking av hugtakinum stjórnarskipan er vanlig í Norðanlondum (á svenskum Grundlag, á norskum Grunnlov og á donskum Grundlov).

Løgfrøðingarnir Bárður Larsen og Kári á Rógvi hava skrivað áhugaverda grein um stjórnarskipan í Fyrra flaggdagsáliti. Greinin er ein góð lýsing av hugtakinum konstitutionalismu við atliti til føroysk viðurskifti. Um endamál við stjórnarskipan siga teir:"Mangir hættir eru at lýsa eina stjórnarskipan, og ongin einstøk lýsing kann vera einsamøll. Men flestu eru samd um, at eitt av høvuðsendamál við skrivaðari stjórnarskipan er at skapa støðugleika og framhald.„ Í greinini verður eisini víst á tveir vanligar hættir at lýsa munin ímillum vanliga lóg og stjórnarskipan (grundlóg). Annar er tann formligi munurin, sum snýr seg um, hvussu lógin verður samtykt og broytt, og hin munurin er tann innihaldsligi, ið heftir seg við, hvørji viðurskifti, ið stjórnarskipanin hevur ásetingar um.

Stjórnarskipanir eru ymiskar frá einum landi til annað. Tó eru nøkur alfevnd eyðkenni. Stjórnarskipanir regulera skipanina av stjórnini, áseta ofta slag av politiskari skipan (forsetaskipan, tingræðisskipan ella blandingsskipan), skipa starv og avmarkingar hjá lóggevandi, útinnandi og dømandi valdi og viðurskiftini

teirra millum, og hvussu valdið er býtt ímillum meginstjórn og statir/landspartar. Eisini er vanliga grundleggjandi rættindaverja (bill of rights) staðfest í eini stjórnarskipan.

Hóast eingin endalig ella alment góðtikin allýsing er tøk av hugtakinum stjórnarskipan, er tað mennandi og skilagott at royna at menna allýsing av hugtakinum, tí á tann hátt verður allýsingin, um hon er nøktandi, eitt gott amboð í viðgerðini av stjórnarskipanarligum viðurskiftum.
Á sama hátt sum ymiskir felagsskapir hava ymisk endamál, hevur ein statur nøkur grundleggjandi endamál. Ósemja man vera um hvørji endamálini eru ella eiga at vera hjá einum stati, tí hugsanir um endamálini eru í stóran mun avgjørdar av tí hugmyndafrøðiligu grund, ið ein stendur á. Tó man ávís semja vera um nøkur grundleggjandi endamál hjá statinum. Ein stjórnarskipan er miðil til at røkka ávís endamál. Í bókini Politics vísir Andrew Heywood á nøkur týdningarmikil endamál, sum ein stjórnarkipan hevur. Tey eru: at geva statum vald ella myndugleika, at staðfesta sameinandi virði og mál, at útvega stjórnarstabilitet (politiskan stabilitet), at verja frælsi og at legitimera stýrið.

Ein stjórnarskipan er eitt slag av spælireglum, sum skipa politisku institutiónirnar og royna at staðfesta greiðar og skilagóðar mannagongdir fyri at tryggja effektivitet og politiskan stabilitet. Hetta er aðaltátturin í konstitutionalismu. Tað øvuta av slíkum skipaðum stjórnarligum viðurskiftum er tilvildarligt og sjálvráðið stjórnarvald. Tær flestu stjórnarskipanirnar innihalda lógargreinar, sum hava sum endamál at forða fyri, at alt valdið verður miðsavnað, og at vandin fyri valdsmisnýtslu harvið verður øktur. Roynt verður at skipa greiðan skilnað millum útinnandi, lóggevandi og dømandi vald. Gott dømi um slíka lógargrein er at finna í pólsku stjórnarskipanini § 10, stk 1:"The system of the Republic of Poland shall be based on the separation of and balance between the legislative, executive and judicial powers.„ Í hesi grein verður greitt staðfest, at valdið í pólsku politisku skipanini er tríbýtt og eitt av endamálunum við hesum býti er at tryggja stjórnarstabilitet.

Samanumtikið kann sigast, at í frælsum fólkaræðisligum skipanum verður mett, at høvuðsendamálið við eini stjórnarskipan er at avmarka stjórnarvaldið við tí fyri eyga at verja rættindini hjá einstaklingum.

Ein føroysk stjórnarskipan

Ofta verða nýggjar stjórnarskipanir smíðaðar í sambandi við kreppu ella kollvelting. Borgararnir royna í slíkum førum at staðfesta grundleggjandi rættindi og annars at leggja lunnar undir komandi samfelagið. Góð dømi um hetta eru amerikanska Frælsisyvirlýsingin frá 1776 og franska Mannarættindayvirlýsingin frá 1789. Men spurningurin er, um flestu borgarar í slíkum broytingartíðum eru

nóg „edrúiligir“ politiskt til at staðfesta og allýsa virði fyri framtíðar samfelagið. Løgfrøðingarnir Bárður Larsen og Kári á Rógvi hava skrivað áhugaverda grein í Fyrra flaggdagsáliti, sum teir nevna Skipanin. Um fyritreytirnar hjá føroyingum at smíða eina stjórnarskipan, siga teir t.d.: Møguleiki er tó fyri, at føroyingar í síni tilgongd eru hepnari enn flest onnur fólk. Long tíð er nú liðin síðan seinastu kreppu, og fólkið kann sigast aftur at vera nóg „edrúiligt“ til at leggja treytir fyri komandi samfelagið. Sambært hesi fatan er tíðin lagalig til at seta á stovn nýggja eina stjórnarskipan.

Tað verður av fleiri mett at vera týdningarmikið, at føroyska fólkið staðfestir og lýsir, á egnum máli, hvat fólkið er, og hvørja grund fólkið byggir samfelagið á. Arbeitt verður framvegis við at smíða eina nýggja føroyska stjórnarskipan. Grundarlagið fyri hesum arbeiði er frágreiðing frá gomlu Grundlógarnevndini og frágreiðing frá formanninum í Stjórnarskipanarnevndini (Fyrra flaggdagsálit frá 2004). Stjórnarskipanarnevndin er sett saman av politikarum og serfrøðingum. Nevndin skal lata landsstýrinum álit og uppskot til stjórnarskipan í seinasta lagi 31. desember í 2006.

Nevndin hevur ein søguligan møguleika at smíða eina grundleggjandi lóg fyri Føroyar. Stríð um ríkisrættarliga spurningin hevur í stóran mun eyðkent politiska kjakið í Føroyum. Arbeiðið í Stjórnarskipananevndini er eitt gylt høvi hjá øllum politiskum flokkum at prógva, at føroyingar kunnu semjast um at staðfesta elligomlu virðini, støðu landsins við onnur lond og tey rættindi, sum fólkið longu hevur og menna tey víðari.

Ein nýggj stjórnarskipan verður samtykt av fólkinum. Tað er fólkið, sum, við hesi skipan, staðfestir sín samleika, virði og rættindi. Upprunin til hesa nýggju grundleggjandi lóg er sostatt føroyska fólkið. Fólksins vilji er tann evsti myndugleikin, og tí skulu aðrar lógir smíðast við støði í andanum í teirri nýggju skipanini.

Í uppskoti til formæli stendur:”Vit, fólkið í Føroyum, samtykkja hesa stjórnarskipan okkara. Hon er grundarlag undir stýri okkara og tann fyriskipan, ið skal tryggja frælsi, trygd og trivnað okkara.„

Vónandi fer viljin at fáa í lag eina tjóðskaparliga semju at vinna á teimum ósemjum og trætum, sum forða fyri, at føroyingar smíða sína egnu grundleggjandi skipan við støði í felags samleika.

Bókmentir

Alexander, Larry (ritstjóri): Constitutionalism. Philosophical Foundations. Cambridge University Press, Cambridge 2001.

ButleRitchie, David T.: The Confines of Modern Constitutionalism.
Pierce Law Review, vol. 3, no. 1, s. 1-32, 2004.

Elkin, L. Stephen og Karol Edvard Soltan (ritstjórar): A New Constitutionalism.
The University of Chicago Press, Chicago 1993.

Elster, Jon: Ulysses Unbound. Cambridge University Press, Cambridge 2000.

Elster, Jon: Forces and Mechanisms in the Constitution-Making Process. Duke Law Review, vol. 45, s. 364-396, 1995.

Evans, Mark: Studying the New Constitutionalism: Bringing Political Science back in.
British Journal of Politics and International Relations (BJPIR), vol. 3, no. 3, s, 413-426.

Ferejohn, John o.a. (ritstjórar): Constitutional Culture and Democratic Rule.
Cambridge University Press, Cambridge 2001.

Formansskapurin í Stjórnarskipanarnevndini: Frá grundlóg til stjórnarskipan.
Stjórnarrit 2, Dimmalætting 4. juni 2004.

Fyrra Flaggdagsálit. Frágreiðing frá formanninum í Grundlógarnevndini.
Grundlógarnevndin, Tórshavn 2004 (endurprentað í desember 2005).

Hague, Rod og Martin Harrop: Comparative Government and Politics. An Introduction. Palgrave MacMillan, 6. útgáva, New York 2004.

Hayk, F.A.: The Constitution of Liberty. Routledge, London 1999 (fyrstu ferð útgivin í 1960).

Heywood, Andrew: Key Concepts in Political Science. Palgrave MacMillan, New York 2000.

Heywood, Andrew: Political Theory. An Introduction.
Palgrave MacMillan, 3. útgáva, New York 2004.

Heywood, Andrew: Politics. Palgrave MacMillan, 2. útgáva, New York 2002.

Husa, Jaako: Nordic Reflections on Constitutional Law. Peter Lang, Frankfurt am Main 2002.

Lane, Jan.Erik: Constitutions and Political Theory. Manchester University Press, Manchester 1996.

Larsen, Bárður og Kári á Rógvi: Skipanin. Fyrra Flaggdagsálit. Frágreiðing frá formanninum í Grundlógarnevndini. Grundlógarnevndin, Tórshavn 2004 (endurprentað í desember 2005).

Lutz, Donald S.: The Origins of American Constitutionalism.
Lousiana State University Press, Baton Rouge 1988.

Maddex, Robert L.: Constitutions of the World. Congressional Quarterly Inc, 2. útgáva, Washington 2001.

Madison, James o.a.: The Federalist Papers. Mentor, a division of Penguin Putnam Inc., New York 1999.

Malnes, Raino og Knut Midgaard: Politisk tenkning. Universitetsforlaget, 2. útgáva,
Oslo 2004.

Rasmussen, Rúni: Valdsbýti. Føroyskt Lógar Rit (FLR), vol. 5, no. 1, Tórshavn 2005.

Rosenfeld, Michel (ritstjóri): Constitutionalism, Identity, Difference, and Legitimacy.
Duke University Press, London 1994.

Sunstein, Cass R.: Designing Democracy What Constitutions Do. Oxford University Press, Oxford 2001.

Vile, M.J.C.: Constitutionalism and the Separation of Powers.
Liberty Fund, 2. útgáva, Indianapolis 1998.

Heimasíður

Http://www.freedomhouse.org/template.cfm?page=130&year=2005.
Tikið av internetinum 8. mars 2006.

Http://plato.stanford.edu/entries/constitutionalism/
Tikið frá internetinum 8. mars 2005.

Rúni Rasmussen hevur tikið B.S.Sc.-prógv í stjórnmálafrøði, B.A.-prógv í søgu og mentanarfrøði og M.S.Sc.-prógv í stjórnmálafrøði á Fróðskaparsetri Føroya. Hann er skrivari í Stjórnarskipanarnevndini.

Freedom House varð stovnað av Eleanor Roosevelt og øðrum í 1941. Stovnurin hevur sum endamál at virka fyri og verja fólkaræði og frælsi í øllum heiminum. Stovnurin gevur javnan út tilfar, sum vísir støðuna í heimsins londum (serliga fullveldisríkjum) í samband við fólkaræði og frælsi. Heimasíðan: www.freedomhouse.org.

Http://www.freedomhouse.org/template.cfm?page=130&year=2005. Tikið av internetinum 8. mars 2006.

Tó nýtist hetta ikki vera so, tá ið tað ikki er nøkur forðing fyri, at eitt stýri við lítlum ella ongum fólkaræðisligum innihaldi kortini er so mikið at sær komið, at týðandi avgerðir í stóran mun fylgja reglum, ið eru staðfestar frammanundan. Men hetta er ástøði. Í veruleikanum er oftast so, at semja framman undan um spælireglurnar í einum samfelagi er treytað av líknandi virðing millum menniskju, ið illa fær verið uttan undir onkrum slagi av fólkaræði. Tí ber til við einum ávísum rætti at siga, at løgræði (Rule of Law) er tengt at fólkaræðisligari skipan.

Í bók síni Political Theory sigur Andrew Heywood t.d. hetta um mál og hugtøk: „Language is both a tool with which we think and means by which we communicate with others. If the language we use is confused or poorly understood, it is not only difficult to express our views and opinions with any degree of accuracy but it is also impossible to know the contents of our own minds.„ Sí Heywood, 2004, s. 1.

Http://plato.stanford.edu/entries/constitutionalism/ Tikið frá internetinum 8. mars 2005.

Alexander Hamilton lýsir væl avbjóðingina at skapa eina nýggja stjórnarskipan í The Federalist Papers no. 1: „It has been frequently remarked that it seems to have been reserved to the people of this country, by their conduct and example, to decide the importan question, whether societies of men are really capable or not of establishing good government from reflection and choice, or whether they are forever destined to depend for their political constitutions on accident and force.„ Sí Madison, 1999, s. 1.

The Federalist Papers nr. 51. Sí Madison, 1999, s. 290.

Viðmerkjast skal tó, at til ber at hava eina konstitutionella stjórnarskipan uttan tó at hava eitt grundleggjandi politiskt skjal (stjórnarskipan). Ongland og Ísrael eru dømi um lond við einum slagi av konstitutionellari skipan, hóast tey ikki hava eina skrivaða stjórnarskipan. Men ivasamt er tó, um tað í slíkum føri ber til at siga, at landið hevur eina stjórnarskipan í modernaðari merking.

Lane, 1996, s. 19.
Ibid.
Vile, 1998, s. 408.
Hayek, 1999. s. 181.
Rosenfeld, 1994, s. 3.
Heywood, 2004, s. 154.

Dømi um grundleggjandi rættindi: talufrælsi, skrivifrælsi, trúarfrælsi og privatur ognarrættur. Í donsku ríkisstjórnarskipanini verður t.d. tali- og skrivifrælsi staðfest í § 77: „Enhver er berettiget til på tryk, i skrift og tale at offentliggøre sine tanker, dog under ansvar for domstolene. Censur og andre forebyggende forholdsregler kann ingensinde pány indføres.„ Allar stjórnarskipanir í fólkaræðisligum londum staðfesta og tryggja verju av grundleggjandi rættindum.

ButleRitchie, 2004, s. 3.
Ibid. s. 4.
Ibid. s. 6.

Annars er ButleRitchie ein av teimum atfinningarsomu høvundum, ið sær modernaða konstitutionalismu sum umboð fyri og avleiðing av upplýsingstíðarhugsan, ið hevur ov stórt álit á menniskjans evnum til at bólka og endaliga lýsa politiska og sosiala heimin; harvið eisini hugsanin, at til ber í einum einstøkum skjali at skriva og staðfesta grundviðtøkur fyri eitt heilt samfelag. Hetta er kortini heilt annað evni, ið ikki verður viðgjørt í hesi grein.

Formansskapurin í Stjórnarskipanarnevndini, 2004.
Husa, 2002, s. 15.
Ibid. s. 16.
Larsen, 2004, s. 38.
Ibid. s. 39.

Hóskandi er at gera vart við, at í norsku stjórnarskipanini er eingin áseting, sum staðfestir, at tingræðislig skipan er galdandi í Noregi. Lond kunnu sostatt óformliga lata stórar og grundleggjandi broytingar henda. Sí Fyrra flaggdagsálit, 2004, s. 38.

Bill of Rights kann umsetast til rættindaskjal. Eitt slíkt rættindaskjal er eitt løgfrøðiligt skjal, sum tryggjar og staðfestir frælsi og borgarlig rættindi. Tey fyrstu tíggju ískoytini til amerikonsku stjórnarskipanina er eitt dømi. Nevnast kann fyrsta ískoytið, sum er soljóðandi: Congress shall make no law respecting an establishment of religion, or prohibiting the free exercise thereof; or abridging the freedom of speech, or of the press; or the right of the people peaceably to assemble, and to petition the Government for redress of grievances.„

Andrew Heywood allýsir í bókini Key Concepts in Politics eina stjórnarskipan á henda hátt:"A Constitution is, broadly, a set of rules that seek to establish the duties, powers and functions of the various institutions of government, regulate the relationship between them, and define the relationship between the state and

the individual. Constitutions thus lay down certain meta-rules for the political system; in effect, these are rules that govern the government.„ Sí Haywood, 2000, s. 196.

Heywood, 2002, s. 298.

Viðmerkjast skal, at munur er á valdsbýti millum útinnandi og lóggevandi vald í ávikavist tingræðisskipan og forsetaskipan. Tað er ikki talan um veruligt valdsbýti millum lóggevandi og útinnandi vald í skipan við tingræði, tí stjórnin (samgongan) hevur bæði tað lóggevandi og útinnandi valdið. Harafturímóti er hetta býti veruligt í forsetaskipan, tí bæði lóggevandi og útinnandi vældini eru vald hvør sær beinleiðis av fólkinum. Tað besta dømið um slíka skipan er tann amerikanska politiska skipanin. Fólkið velur umboð til Kongressina (Umboðsmannatingið og Senatið), sum er lóggávuvald, og forsetin (útinnandi vald) verður eisini valdur av fólkinum. Sí Rasmussen, 2005, s. 14-23.

Vanliga verður skilt ímillum tvey sløg av rættindum, nevniliga negativ og positiv rættindi. Í frælsari konstitutionalismu verður høvuðsdentur lagdur á tey sokallaðu klassisku ella siðbundnu borgararættindini. Endamálið við at seta eina stjórn á stovn er at verja slík rættindi. Hesi eru tey sokallaðu negativu rættindini. Alt fleiri lond hava ásetingar um búskaparlig, sosial og mentanarlig rættindi. Dømi um slík rættindi eru: rættur til sjúkrahjálp, útbúgvingarrættur og rættur til forsorgarhjálp. Hesi eru tey sokallaðu positivu rættindini. Hesi rættindi hava ofta elvt til kjak, tí hesi rættindi krevja víðkan av almenna myndugleikanum. Fyritreyt fyri úvegan av slíkum rættindum er jú ein statur við stórum búskaparligum og sosialum tilfeingi. Er tað nøkur orsøk til at orða trygging av slíkum rættindum í eini stjórnarskipan, um tað ikki er møguligt hjá statinum at veita tær tænastur, sum rættindini krevja? Greitt er, at hetta er ein hugmyndafrøðiligur spurningur. Í indisku stjórnarskipanini verður t.d. ásett, at rætturin til arbeiði verður tryggjaður „within the limits of economic capacity and development.„ Sí Heywood, 2002, s. 299.

Norski heimspekingurin Jon Elster hevur skrivað sera áhugaverda grein, sum nevnist Forces and Mechanism in the Constitution-Making Process. Greinin lýsir og viðger ymiskar mekanismur í sambandi við stjórnarskipanarsmíð. Elster vísir á, at stjórnarskipanir tykjast at koma fram í bylgjum. Hann sigur, at í minsta lagi sjey bylgjur kunnu staðfestast. Sí Elster, 1995, s. 368.

Larsen, 2004, s. 39.

Heimasíðan hjá nevndini er: http://www.ssn.fo.

Grundarlagið undir arbeiðinum hjá nevndini er løgtingslóg nr. 79 frá 8. mai 2003 um stjórnarskipanarnevnd, sum broytt við løgtingslóg nr. 72 frá 23. mai 2005.

Cass R. Sunstein vísir í bókini Designing Democracy á, at til ber at finna semjur hóast fólk eru ósamd um konstitutionell átøði. Hesar semjur nevnir hann uncompletely theorized agreements. Um hetta sigur Sunstein:"My basic suggestion is that people can often agree on constitutional practices, and even

on constitutional rights, when they cannot agree on constitutional theories. In other words, well-functioning constitutional orders try to solve problems, including problems of deliberative trouble, through reaching incompletely theorized agreements. Sometimes these agreements involve abstractions, accepted amid severe disagreement on particular cases.„ Sí Sunstein, 2001, s. 50. Tað er hóskandi at vísa á eitt dømi. Fólk kunnu hava ymiskar meiningar (ella ástøði) um hví ein stjórnarskipan eigur at staðfesta eitt valdsbýti. Onkur heldur, at valdsbýti er trygd ímóti harðræði. Onnur halda, at valdsbýti ger eina stjórn meira fólkaræðisliga; og onnur meta, at valdsbýti fremur størri effektivitet. Á sama hátt kunnu føroyingar semjast um, at tað er skilagott og neyðugt at seta á stovn eina nýggja føroyska stjórnarskipan, hóast ávísar ósemjur eru um grundarlagið (ástøðið) undir eini nýggjari skipan.

Restin av formælinum er soljóðandi:"Vit bygdu hetta landið í fornari tíð og skipaðu okkum við tingi, lógum og rættindum. Vit hava hildið ting til henda dag og skipað okkum eftir fólksins tørvi um landið alt. Føroyar hava í sáttmála viðurkent felagsskap við onnur lond. Ongin sáttmáli kann sløkkja sjálvræði landsins. Landsins egnu lógir og avgerðir eru bert tær, sum framdar eru á rættan hátt í landinum sjálvum eftir fólksins vilja. Føroyar verða skipaðar eftir nútíðar tørvi á siðaarv okkara við valdsbýti, løgræði og rættindum.„ Sí Fyrra flaggdagsálit, 2004, s. 18.

Johan Dahl, løgtingsmaður

Hoyvíkstilgongdin

Íslandssáttmálin – var talan um góðan sáttmála?
Hvar er so trupuleikin, kunnu tit spyrja?
Samráðingartilgongdin
Stýrisskipanarlógin – er nakar tulkingarivi?
Aðrir millumtjóðasáttmálar sum lóg
Hví verður so gjørt á hendan hátt?

Johan Dahl løgtingsmaður ger í hesi grein viðmerkingar til tilgongdina, tá sáttmáli um samhandil við Ísland varð samtyktur. Først verður fram, at sáttmálin í innihaldi kann gerast týðandi, men kortini er ófullfíggjaður og ov illa samskipaður við sáttmálan um fiskiveiðirættindi. Serliga verður tó funnist at handfaringini hjá løgmansskrivstovuni, ið frá byrjan vildi seta bæði løgtingsins ávirkan og stýriskipanarlógarinnar ásetingar til viks. Hetta førdi til stríðið um, hvørt lóg ella samtykt var rætti formurin til viðtøku av sáttmálanum. Løgmaður lat um seg ganga hesa framferð, ið sjálvsagt ger lívið lættari hjá fyrisitingini, men stríður ímóti bæði tingskipan, góðum lógarsmíði og fólkaræðisligari viðgerð og ávirkan.

Íslandssáttmálin – var talan um góðan sáttmála ?

Lat tað verða sligið fast, at allir flokkar á Løgtingi uttan undantak eru á einum máli um, at Íslandssáttmálin skal fremjast í verki, tí vit meta, at hóast tað í løtuni eru avísir ójavnar í sáttmálanum, so vil hesin kortini gagna føroyska samfelagnum og geva okkum ein nýggjan marknað at virka á frameftir.

Mín vón er sjálvandi, at hesin sáttmálin verður góður – eisini fyri Føroyar, tí nú er hann sera góður fyri Ísland – men skal hann gerast eins góður fyri Føroyar, skal misjavnin um, hvør kann virka og vinna í Íslandi, verða tillagaður, so at føroysk virki og vinnuligir persónar kunnu sleppa at virka fisk og eiga virki í Íslandi við somu treytum og sømdum, sum íslendingar sjálvir. Vinnulógávan er soleiðis, at teir kunnu eiga í okkara vinnutólum, undir 50% í skipum og 100% í øllum øðrum virkjum, men vit kunnu als ikki eiga í teirra skipum og bert minniluta í fiskivinnuvirkjum.

Eisini vantar ymiskt annað, til dømis at íslendsku uppsjóarskipini fáa loyvi at landa í Føroyum til matna, at føroysk skip kunnu fiska til matna í íslendskum sjógvi, t.d. lodnu og sild.

Fyrimunurin hjá íslendingum er tann, at teir hava nógv fjølbroyttari vinnu enn vit og fáa tí størri fyrimunir enn vit, tá ræður um útflutning…

Tá sáttmálin bleiv undirskrivaður, kundu íslendsk feskfiskaskip ikki landa í Føroyum uttan at verða áløgd plus 10% uppá landingarvektina, harvið minkaði kvotan, og tað bleiv ikki áhugavert hjá teimum at landa her. Hesin trupulleiki er loystur. Tá sáttmálin er ígildissettur, er lovað at tað eisini tá skal verða frítt hjá føroyskum og íslendskum feskfiskaskipum at landa ávikavíst í Íslandi og Føroyum á góðkendum landingarstøðum.

Einans tíðin vil vísa um sáttmálin er gagnligur fyri Føroyar, og tað er at vóna, at hann verður. Um ikki hann vísir seg at vera nøktandi, so er uppsagnarfreist í sáttmálanum.

Hvar er so trupuleikin, kunnu tit spyrja?
Trupuleikin er hátturin hesin sáttmálin verður framlagdur á Løgtingi – nevniliga sum uppskot um løgtingslóg ístaðin fyri uppskot til samtyktar við viðløgdum uppskotum um fylgilógir.

Neyðugt er tíverri at minna á, at Løgtingið hevur tað lóggevandi valdið her á landi. Landsstýrið og løgmaður kunnu einans leggja fram uppskot og staðfesta samtyktu uppskotini, men løgtingið ger av og hevur valdið.

Landsstýrið ger eftir grein 52 í stýrisskipanarlógini altjóða sáttmálar, men skal Løgtingið í flestu førum geva sítt samtykki. Vanliga managongdin hevur verið, at sáttmálar verða viðgjørdir í tinginum sum uppskot til samtyktar og hervið fingið samtykki tingsins. Landsstýrið ella løgmaður kunnu síðani staðfesta sáttmálan, ið tá gerst millumtjóða (fólkarættarliga) bindandi.

Hesar millumtjóða sáttmálar eru ikki bindandi fyri einstaka føroyingin. Landsstýrið má tí – fyri at ikki ósamsvar skal vera millum millumtjóða sáttmálan og landsins lóg –skjóta upp neyðugar lógarbroytingar.

Í hesum førinum varð roynt at gera alt í einum. Skotið varð upp at samtykkja sáttmálan og fremja lógarbroytingar við somu samtykt og sama skjali. Men sáttmálin sjálvur inniheldur ikki tær einstøku lógirnar, eiheldur útgreinar hesin nakrar lógir.

Sáttmálin er í veruleikanum „arbeiðsskjalið„ sum sigur, á hvørjum økjum, vit samstarva, og undir hvørjum treytum, vit samstarva, tvs. rætningslinjur til nýtslu partanna millum.

Tað er tí sera umráðandi at sjálvt lógarverkið fylgir við og verður dagført, so at fyrst

og fremst vinnan veit, hvat alt hetta inniber, hvat er møguligt og ikki. Somuleiðis er tað eisini umráðandi, at borgarin hevur greiðar lógarkarmar at halda seg til.

Hetta arbeiðið skal verða gjørt áðrenn sáttmálin verður ígildissettur eftir teimum vanligu mannagongdunum. Talan er um trýpartasáttmála, og fremja bæði íslendingar og danir sáttmálan á henda vanliga háttin. Hinvegin velja løgmaður og hansara umsiting heldur ta „smartu loysnina" at gera sjálvan sáttmálan til lóg og harvið samtykkja og seta „allan pakkan„ eisini ósundurgreinaðar lógarbroytingar, í kraft við lóg heldur enn at staðfesta hann fyrst við løgtingssamtykt saman við fylgilógunum, og so ígildisseta hann endaliga, tá fylgilógirnar eru tillagaðar – eins og hinir sáttmálapartarnir, Ísland og Danmark, gera.

Samráðingartilgongdin

Men trupulleikarnir byrjaðu nógv fyrr. Tað var jú soleiðis, at hesin sáttmálin bleiv samráddur undir fyrru samgongu við Anfinni Kallsberg sum løgmanni, og tískil var einans „fínpussing" eftir at gera av orðingum í sjálvum sáttmálanum, áðrenn hann bleiv lagdur fyri Løgtingið til fyrstu viðgerðar.

Eg havi tó mangan undrast á, hví okkara menn fóru júst til Íslands at fáa slíkan sáttmála og ikki til Noregs ella ES at royna at fáa betri sáttmálar í lag. Kanska eru okkara menn blindaðir av ógvusliga íslendska íløguhuginum og framferð teirra í Evropa á handilsliga økinum og vilja tí royna at læra føringar at hugsa og virka sum hesir?

Løgmaður ráðførdi seg við uttanlandsnevndina og var í fleiri umførum innkallaður til fundar undir viðgerðini, ikki minst tí semja var ikki um, eftir hvørjum leisti sáttmálin skuldi setast í gildi. Løgmaður og hansara fyrisiting høvdu tó frá fyrsta degi sett sær fyri at nýta hendan nýggja leistin, nevniliga at seta sáttmálan sjálvan í gildi sum løgtingslóg og ikki sum samtykt. Hetta var helst tí at løgmansumsitingin óttaðist at koma í tíðarneyð við teimum lógum, sum teir kanska ikki náddu at tillaga, áðrenn tingsetan var av. Serliga var hetta sera einføld loysn eftir teirra metan, men sum lógarsmíð var hetta sera vánalig loysn.

Henda nevnda tíðarneyð komst av, at forarbeiðið var ikki gjørt nóg væl. Eingin tók stig til at taka uppgávuna upp á seg at samskipa tað neyðuga arbeiðið. Einstøk ráð royndu tó hvørt í sínum lagi at gera tað, sum eftir umstøðunum bar til innan teirra øki. At eingin hevði sett seg inn í, hvat ítøkiligu avleiðingarnar av sáttmálanum vóru, varð ein trupulleiki longu í sambandi við fyrstu ráðførðslurnar undir samráðingunum, og hetta gekk aftur sum ein reyður tráður heilt til endans, og eru hesi viðurskifti framvegis ikki greið. Eg haldi, at hesin hugburður er ræðandi og elvir til nakrar grundleggjandi spurningar um útlitini fyri framtíðar lóggávu í Føroyum.

Sjálvur haldi eg, at løgmaður ráførdi seg tað, sum neyðugt var, men at umsiting hansara pressaði á at fáa just ta loysn, sum fyriliggur í dag, og sum eftir míni meting í veruleikanum hevur sum endamál at gera Føroya Løgting til eitt stempulkontór heldur enn lóggevandi vald. Tað sýnist sum at løgmansumsitingin við hesum snildisliga vil tiltuska sær meira og meira vald og harvið yvirrula løgtingið. Hvør onnur grund er at gera, sum gjørt varð?

Hinvegin hevur danska stjórnin enn ikki fingið sín part av ríkislógarbroytingum framdar, og vit hava ikki enn fingið endaligt svar uppá, hvørjar hesar eru – hervið meini eg eitt komplett yvirlit yvir hvørjar lógir skulu broytast. Her er eftir mínum tykki gjørt alt ov lítið frá løgmansfyrisitingini fyri at fáa endaliga avklárað, hvørjar ríkislógir veruliga verða neyðugar at broyta/tillaga.

Í løtuni liggur sáttmálin til ummælis/viðgerðar í Justitsministeriunum

Uttanlandsnevndin royndi sjálv undir viðgerðini at fáa neyðugu upplýsingarnar frá dønum, men fingu at vita at teir ikki út í æsir í teimum ymsu ministeriunum høvdu gjøgnumgingið hvat neyðugt var at broyta. Løgmaður vísti til tað yvirilitið, sum sent varð saman við lógaruppskotinum yvir lógarbroytingar.

Stýrisskipanarlógin – er nakar tulkingarivi?

Nú kundi alt skyldast iva um stýrisskipanina, men tað er als ongin ivi um hvat stýrisskipanarlógin og tingskipan løgtingsins siga. Reglurnar um góðkenning av sáttmálum eru at finna í stýrisskipanarlógini § 52, stk. 2 og stk. 3, har sagt verður, at „Uttan samtykki løgtingsins kann landsstýrið tó ikki gera avtalur, sum krevja luttøku løgtingsins fyri at verða útintar, ella sum annars eru týdningarmiklar.„

Útgangsstøðið í § 52, stk. 2, og § 52, stk. 3, er, at samstundis sum avtalan verður góðkend, verða eisini tær lógarbroytingarnar samtyktar, sum eru neyðugar at fremja avtaluna í verki. Legg til merkis, at her verður als ikki tosað um at gera hesa til lóg.

Hinvegin hava løgmaður og umsiting hansara við at leggja uppskotið fram sum lógaruppskot og ikki sum uppskot til samtyktar „bypassað“ hesar ásetingar, tí nú er tað – í gásareygum – jú ikki ein millumtjóðasáttmáli, vit hava við at gera og viðgera, men eitt lógaruppskot, og tískil kemur hann ikki í stríð við stýrisskipanarlógina grein 52, stk. 2, og grein 52, stk. 3, – snildislig um ikki sørt ódámlig parering av hesum máli, ið Løgtingsskrivstovan ikki metti seg kunna avvísa.

Vísast kann eisini til skrivið frá Halgir W. Poulsen til uttanlandsnevndina í sambandi við viðgerðina av málinum, har hann eisini viðger grein 55 í

stýrisskipanarlógini. Sjónarmið hansara hesum viðvíkjandi í sambandi við sáttmálan eru sera áhugaverd.

Tingsskipanin grein 48 sigur annars eisini heilt greitt, hvussu slíkar avtalur skulu viðgerast á Føroya Løgtingi, og hava tingmenn við at samtykkja sáttmálan sum lóg eisini tilonkisgjørt sína egnu tingskipan. Tað sigur ikki so lítið.

Í samstarvinum millum løgtings- og løgmansskrivstovuna eru viðurskifti, sum als ikki eru nøktandi eftir míni metan, tí hesar báðar áttu at samstarva tætt, men ofta virkar tað, sum umsitingin í Tinganesi vil tiltuska sær meiri vald enn gott er, og tí verður tíverri eisini stríð og gný millum hesar báðar stovnar.

Eg má her skoyta uppí, at eg als ikki skilji Løgmann, at hann letur umsitingina soleiðis „trilla" runt við sær í tí sum hendi við íslandssáttmálanum. Hetta tænir ikki honum til sóma, tí løgmaður eigur sum ein ørn at verja okkara stýrisskipan og tingskipan heldur enn at finna snildisligar hættir at yvirrula hesar.

Aðrir millumtjóðasáttmálar sum lóg

Tað hevur eisini verið róð fram undir undir viðgerðini, at aðrir millumtjóðassáttmálar undan hesum hava verið framdir við lóg, m.a. Evropeiski Mannarættindasáttmálin og skattaavtalan við Grønland um sjómenn.

Til hetta er at siga, at tann seinni sáttmálin hevur so neyvar skattatekniskar lógartekstir, tí mælti toll- og skattastovan til at gera sáttmálan til lóg fyri ikki at ógreiða skattalóggávuna óneyðuga; víst varð á, at allur neyðugur lógartekstur var tilstaðar. Tá fyrstnevndi, Mannarættindasáttmálin var fyri, var eisini allur lógarteksturin tilstaðar á enskum og donskum, og tí var ikki trupult at implementera hendan, men hartil hoyra mannarættindi annars til slíka yvirskipaða, opið orðaða og heilt serliga regulering – har fordømini hjá mannarættindadómstólinum stýra í mestan mun – at ein samanbering við ein handilssáttmála við Ísland ber als ikki til.

Tí haldi eg, at tað hevur verið heilt burturvið, tá løgmansfyrisitingin hevur brúkt hesar báðar sáttmálar sum fyrimynd fyri eisini at fremja Hoyvíkssáttmálan sum lóg, tí tað er sera stórur munur á hesum sáttmálum og Hoyvíkssáttmálanum, sum meira er at samanbera við eitt arbeiðsskjal við góðum intentiónum, og sum ikki hóska seg til at verða framdar sum lóg í einum framkomnum rættarsamfelag – sum vit helst vilja kallast, men eg eri nú farin at ivast, um vit eru tað.

Politikkur og jura áttu at sampakkað væl saman, tí hesi bæði eru oftani tengd at hvørjum øðrum í politiska arbeiðnum, men tað er eftir míni meting sera óheppið, tá tann politiska loysnin tekur yvirhond og verður orsøk til eitt sera ússaligt lógarsmíð, sum ikki er nøktandi fyri hvørki vinnuna ella borgaran.

Hví verður so gjørt á hendan hátt?
Jú, við at lóggeva sáttmálan sjálvan, so yvirrular hann eisini lógararbeiðið í samband við sáttmálan, tí stýrisskipanarlógin staðfestir, at sáttmálin er yvir øllum føroyskum lógum, og í viðmerkingunum til § 2 í Hoyvíkssáttmálanum verður sagt: „Við hesum verður ikki neyðugt við fleiri uppskotum til løgtingslóg til tess at útinna sáttmálan, av tí at sáttmálin fær tjóðarrættarligt gildi viðvíkjandi nevndu málsøkjum.„

Altso, við at lata Hoyvíkssáttmálan fáa løgtingslógargildi hava Føroyar framt allar neyðugar broytingar í løgtingslóggávu, sum skulu til, fyri at sáttmálin kann verða útintur.

Við at lógarfesta sáttmálan geva londini eisini felagsnevndini sera rúmar heimildir.

§ 8, stk. 2, í sáttmálanum sigur: „Felagsnevndin kann í semju gera av at broyta grein 5, 6 og 7 (Tjóðskaparviðferð 5C iv, Undantøk frá Tjóðskaparviðferð og Samstarv á øðrum økjum) og somuleiðis frumskjølini í hesum sáttmála ella leggja frumskjøl afturat sum ásett í grein 7, stk. 2.„

Fyri at skera hetta út í papp: Felagsnevndin hevur eftir løgtingslógini um Hoyvíkssáttmálan hervið fingið neyðugu heimildinar frá Løgtinginum at fremja broytingar í grein 5, 6 og 7 og í frumskjølunum, hetta uttan at neyðugt er at koma aftur í Løgtingið við hesum, tí heimildin er givin teimum við løgtingslógini, og eisini við at løgmaður við kunngerð kann broyta lógirnar. Áður nýttar felagsnevndir hava havt langt frá somu heimildir.

Hendan áseting bleiv broytt undir nevndarviðgerðini og fekk felagsnevndin skerdar heimildir.
Grein 13 í sáttmálanum ásetir: „Hesin sáttmálin skal staðfestast, góðkennast ella samtykkjast av sáttmálapørtunum í samsvari við teirra innanhýsis mannagongdir.„

Tað er eyðsæð, at sáttmálin eigur at verða lagdur fyri Løgtingið sum uppskot til samtyktar saman við yvirliti yvir fylgilógir, sum skulu tillagast/broytast/dagførast samsvarandi sáttmálanum og fólkarættarligu krøvunum, ið hesin bindir okkum at lúka.

Við heldur at samtykkja lógaruppskotið hevur Føroya Løgting sjálvt verið við til at lata part av lóggávuvaldinum frá sær. Við 2. og 3. viðgerð vildi løgmaður ikki missa andlit, og tíverri spældu flestu løgtingsmenn við í hesum leiki, sum eftir míni metan er skamblettur fyri føroyskan politikk, og vísir hvussu tilvildarliga og lætt verður farið um lógararbeiðið.

Men sum nevnt er tað eitt samt løgting, ið vil seta sáttmálan í gildi. Fyrsti partur av hesum arbeiði er sjálvur sáttmálin, sum er heilt væl úr hondum greiddur. Seinasti parturin er staðfestingin av honum og lógarbroytingunum, sum skulu til.

Vit áttu sum løgting og umboðandi lóggevandi valdið her á landi at latið arbeiðið við íslandssáttmálanum úr hondum sum gott dømi um, at vit gera okkara arbeiði til lítar viðvíkjandi lógartillagingunum og samtykt sáttmálan sum løgtingssamtykt og ikki, ið sum endin bleiv, sum løgtingslóg.

Nevnast skal eisini at meirilutin í uttanlandsnevndini, – hóast hesin valdi at atkvøða lógini ígjøgnum, gjørdi greitt í áliti sínum, at hesin framgangsháttur ikki var tann rætti og ikki skuldi koma fyri aftur, og at sáttmálar av hesum slag í framtíðini áttu at blíva framdir samsvarandi tí mannagongd, sum stýrisskipan og tingskipan áseta.

Íslendingar hava gjørt sítt heimaarbeiði til lítar við at leggja sáttmálan saman við fylgilógunum fyri Altingið sum uppskot til samtyktar. Vit áttu at gjørt tað sama; tá kundu vit havt rætt ryggin og sagt, at arbeiðið er at enda komið og væl úr hondum greitt.